## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av vestri og útsynningi og ælingur, partvís kavi, men eisini sólglottar. Hitin millum 1 og 4 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Fyrrapartin upp í hvassan vind av vestri og ælingur, partvís kavi, men um kvøldið minni vindur og yvirhøvur turt. Hitin millum 1 og 4 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og regn ella mjørki av og á. Hitin millum 5 og 9 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin upp í hvassan vind av útsynningi og okkurt ælið. Hitin um 5 stig. Týsdagin minni vindur av vestri og okkurt kavaælið. Hitin um frostmarkið.

# Ringt er hjá seyðinum...

Hetta er tíðin, tá sólin stendur lágt og tað skýmir tíðliga. Og hetta er somuleiðis tíðin, tá tað er ringt hjá seyðinum og hart er at skava sær føðina fram.

Tað er neyvan gerandissjón at seyður gongur millum húsini í Hoyvík.

Í morgun sóust í øllum førum hesir báðir seyðirnir í hesum býarpartinum, ið liggur beint við óbygdan haga.

Helst eru teir slopnir uppum ella ígjøgnum okkurt hegn, og hava síðani nýtt frælsið sítt til at vitja urtagarðar og plantur í økinum.

Nakað av kava er niðurkomin í nátt, men kortini var ikki so nógv frost, at teir báðir høvdu stórvegis trupulleikar við at finna sær føði.

Hagin er góður, men ein góður biti úr urtagarðinum hjá fólki er ikki at forsmáa!

**sb.**



*Ein góð grasplena er gott kostískoyti hjá svongum seyði*

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -- |
| Nuuk | -- |
| Qaqortoq | -11 |
| Ammassalik | -16 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 0 |
| Seyðisfjørður | 0 |
| Tórshavn | 1 |
| Lerwick | 2 |
| Aberdeen | 3 |
| London | 7 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 4 |
| Keypmannah. | 6 |
| Helsinki | 2 |
| Moskva | -3 |
| Berlin | 7 |
| Warzawa | 6 |
| Kiev | -2 |
| Bukarest | 0 |
| Paris | 7 |
| Madrid | 12 |
| Róm | 12 |
| Malorca | 16 |
| Athen | 14 |
| Malta | 17 |
| Tunis | 17 |
| Beijing | -4 |
| New Dehli | 21 |
| Bangkok | 29 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | -- |
| New York | 3 |
| Miami | 22 |
| Los Angeles | 12 |
| Meksikobýur | 19 |
| Panama | -- |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 25 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 982 hPa. í landsynning úr Hvarvinum kemur hendavegin og dýpist. Tað gevur storm á okkara leiðum fríggjanáttina.




**Í dag:**
Lágtrýstið í landnyrðing úr Føroyum fer spakuliga í landnyrðing.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 22/01 kl. 06⁰⁰ – 23/01. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 4,9°
Minsti hiti máldur í januar: ° - Mesti hiti máldur í januar: °

## AVFALLIÐ




Avfallið: 6,0 mm – mált frá 22/01 kl. 06⁰⁰ – 23/01. 06⁰⁰
Avfallið higartil í januar: 75 mm




## VESTFALLSKYRRINDI

15. jan — Fyrra kvarter
19. jan — Mánin næstur jørðini
22. jan. — Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2007

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 24. jan. | 08.03 | 20.25 | 07.03 | 19.25 | 07.18 | 19.40 | 10.03 | 22.25 | 11.03 | 23.25 | 06.18 | 18.40 | 05.18 | 17.40 | 08.18 | 20.40 | 09.18 | 21.40 | 07.48 | 20.10 | 09.03 | 21.25 |
| 25. jan. | 08.48 | 21.09 | 07.48 | 20.09 | 08.03 | 20.24 | 10.48 | 23.09 | 11.48 | - | 07.03 | 19.24 | 06.03 | 18.24 | 09.03 | 21.24 | 10.03 | 22.24 | 08.33 | 20.54 | 09.48 | 22.09 |
| 26. jan. | 09.30 | 21.50 | 08.30 | 20.50 | 08.45 | 21.05 | 11.30 | 23.50 | 00.09 | 12.30 | 07.45 | 20.05 | 06.45 | 19.05 | 09.45 | 22.05 | 10.45 | 23.05 | 09.15 | 21.35 | 10.30 | 22.50 |
| 27. jan. | 10.10 | 22.29 | 09.10 | 21.29 | 09.25 | 21.44 | - | 12.10 | 00.50 | 13.10 | 08.25 | 20.44 | 07.25 | 19.44 | 10.25 | 22.44 | 11.25 | 23.44 | 09.55 | 22.14 | 11.10 | 23.29 |
| 28. jan. | 10.49 | 23.09 | 09.49 | 22.09 | 10.04 | 22.24 | 00.29 | 12.49 | 01.29 | 13.49 | 09.04 | 21.24 | 08.04 | 20.24 | 11.04 | 23.24 | - | 12.04 | 10.34 | 22.54 | 11.49 | - |

